

## Omanlop í Noregi

Fleiri sethús fingu skaða, og fleiri úthús vórðu oyðiløgd í einum omanlopi í gjárkvøldið við norsku bygdina Årdalstangen, sum er í Sogn í Vesturnoregi. Omanlopið var beint eftir midnátt, og sambært løgregluni var tað sera heppið, at eingin mansskaði var. Løgreglan sigur, at summir steinar, sum komu við omanlopinum, vóru millum fimm og seks rúmmetrar til støddar. Myndugleikarnir hava flutt fólkið úr fleiri húsum, meðan jarðfrøðingar kanna, um vandi er fyri fleiri omanlopum, skrivar NTB.

## Í dag er altjóða handikappdagur

3. desember er altjóða handikappdagur, og hendan dagin fer Ráðið fyri Brekað at markera við eini nýggjari heimasíðu. - Ráðið metir, at tað er sera umráðandi alla tíðina at gera vart við viðurskiftini hjá teim brekaðu. Tað skal ein áhaldandi kampur til - hóast tað ikki átti at verið neyðugt, sigur Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna í Ráðnum fyri Brekað. Hon vísir á, at verunleikin kortini er ein annar. - Søgan vísir, at tað hevur verið neyðugt at staðfesta rættindini hjá teimum, ið bera brek, í altjóða sáttmála. Hesin sáttmálin varð staðfestur fyri Føroyar á sumri 2009. Á heimasíðuni eru upplýsingar um virksemi hjá Ráðnum www.radidfyribrekad.fo





*Samstarvið við russar hevur givið nógv báðar vegir, bæði í fiskirættindum, sum sjálvandi eru goldin við fiski undan Føroyum, men eisini í handilssamstarvi um sølu av fiski og teimum mongu umvælingum, sum russisk skip hava gjørt í Føroyum - umframt við ymiskum øðrum veitingum hiðani*

*Í dag hevur verksmiðjutrolarin Skálaberg hjá JFK-Troli í Klaksvík ligið á reduni út fyri Murmansk í 14 dagar. Tíðliga í morgun fór skiparin í land saman við sakførara og meklara, og nú verður vónað, at okkurt spyrst burtur úr, sum dagurin gongur*

trolarafelagið í Murmansk, Murmansk Trawlerfleet, og tað var ígjøgnum teir, at vit funnu JFK-Troli ein góðan meklara. Hetta felag hevur í løtuni tveir bátar, sum liggja á Skála, og hin triði kemur nú 8. desember. Í byrjanini var trupult hjá meklaranum at sleppa fram til myndugleikarnar í Murmansk. Nú gongur frægari, men hann fær ikki nógv at vita haðani.

Árni sigur, at Murmansk Trawlerfleet vísti Faroe Agency á feløg í Kirkjenes og Tromsø í Noregi, sum so aftur kundu vísa teimum á nevnda meklaran.

- Vit settu okkum síðan í samband við JFK-Trol, sum helt, at hetta var eitt gott val, sigur hann.

### Sømilig loysn

Árni Dam heldur tað sjálvsagt vera ógvuliga keðiligt, at skip og manning nú eru afturhildin á reduni í Murmansk í 14 dagar uttan at vita, hvussu verður.

- Men eg haldi, at vit kortni mugu royna at loysa hetta mál á sømiligan hátt og í allari virðiligheit, sum han tekur til.

Russiski konsulin vísir á, at góða samstarvið, sum í so mong ár hevur verið millum Føroyar og Rusland ikki minst á fiskiveiðiøkinum hevur stóran týdning fyri okkum, eins og tað eisini hevur týdning fyri russar.

Hann harmast eisini um, at einki spurdist burtur úr fiskiveiðisamráðingunum millum londini, sum í gjár endaðu úrslitleysar.

- Tað er nú einki óvanligt í, at meira enn tað eina umfarið er í samráðingum av slíkum slagi, men eg haldi, at Føroyar sum samfelag skulu gera alt, sum gerast kann, fyri at byggja uppaftur góða álitið og samstarvið, sum verið hevur millum londini.

Árni Dam vísir á, at tað ikki má koma upp á tal at kuppa á stokkinum við russar, tó at málið um Skálaberg er keðiligt.

- Samstarvið við russar hevur givið nógv báðar vegir, bæði í fiskirættindum, sum sjálvandi eru goldin við fiski undan Føroyum, men eisini í handilssamstarvi um sølu av fiski og teimum mongu umvælingum, sum russar hava gjørt í Føroyum umframt við øðrum veitingum, sum russisk skip hava fingið.

Hann væntar tí, at ein møgulig uppsøgn av samstarvinum millum londini hevði komið Føroyum aftur um brekkur, sum hann tekur til.

### Hvør er loysnin?

Tað er altíð trupult at siga, hvørji ráð eru til at taka, tá støður gerast fastlastar, og viðurskifti sum níva leggja seg millum lond.

Árni Dam ásannar, at ein ávísur kinkur er komin í góða samstarvið millum londini. Hann heldur, at ein gongd leið burtur úr hesi støðu hevði verið at bjóðað umboðum fyri russisku sendistovuna í Keypmannahavn til Føroya at tosa um viðurskiftini.

- Eg haldi, at løgmaður skuldi bjóðað russiska sendimanninum í Keypmannahavn til Føroya, har sínámillum viðurskifti landanna millum kundu verið tikin upp til umrøðu í eini friðarligari "atmosferu", sum hann tekur til.

Vit spurdu eisini russiska konsulin í Føroyum, um talan á nakran hátt kann vera um, at russar nú vilja siga "takk fyri seinast", tá føroyskir fiskiveiðimyndugleikar áður hava tikið tveir russiskar svartkjaftatrolarar undir Føroyum, harav annar framvegis liggur afturhildin á Kollafirði.

- Nei, eg haldi ikki, at talan er um nakað agg ella hevnd, er hann skjótur at svara.

Árni Dam vísir á, at føroyskirfiskiveiðimyndugleikar hava havt gott samstarv við russiskar fiskimenn.

- Russar hava fingið tað skoðsmál frá føroysku vaktartænastuni, at teir eru góðir at vitja. Tað plagar at taka sína tíð við pappírum og slíkum, tá farið verður umborð á skipini, men tá samanum kemur eru viðurskiftini í lagi.

### Teir vistu

Russiski konsulin í Føroyum sigur, at tá føroyska vaktartænastan í fyrraári tók tveir russiskar trolarar, sum fiskaðu á stongdar leið, var hetta púrasta í tráð við okkara fiskiveiðireglur.

- Longu í 2001 vistu russar, at leiðin var stongd, og tí dugi eg ikki at síggja, at hetta mál kann hava nakað sum helst við Skálaberg-málið at gera.

Árni vísir á, at umrøddu russisku trolararnir báðir vórðu tiknir um somu tíð, harav annar loysti aftur, meðan hin, sum kallast Ros, framvegis liggur á Kollafirði, tí reiðaríið hevur ikki verið ført fyri at rindað tað, sum skipinum er álagt.

- Her er tað politivaldið, sum hevur lagt hald á skipið.

Hann sigur, at honum kunnugt vóru skipini í sama felag, sum hevði tveir høvuðspartaeigarar, harav annar doyði.

- Tað eydnaðist at loysa annað skipið aftur, men ikki hitt.

Árni Dam vísir á, at russisku fiskimenninir, sum vóru við Ros, á ymiskan hátt hava fingið nógv hjálp úr Føroyum.

- Fiskimenninir vildu ikki av skipinum, fyrr enn teir høvdu fingið sínar ágóðar frá russiska reiðaranum, og framvegis í dag eru tveir mans eftir.

Russiski konsulin í Føroyum sigur, at eitt nú reiðariið hjá Skálabergi var saman við øðrum við til at fíggja ferðina hjá 19 russarum heim at halda jólafrí.

- Vit bjóðaðu okkum eisini at rinda teirra ferðaseðlar til heimlandið, men tað tók sína drúgvu tíð, áðrenn menn vildu av skipinum – og, sum nevnt, eru framvegis tveir eftir enn, leggur Árni Dam aftrat.